# Tey ungu eru í stórum vanda

SANNROYND

Aldursbólkurin 15-24 ár umboðar einans 18% av fólkatalinum. Men í hesum aldursbólki vóru 40% av teimum, sum hava fingið ringastu skaðarnar í ferðsluvanlukkum.

Hagtølini prógva, at hóast tey í aldursbólkinum 15-17 ár ikki sjálv koyra bil, eru tey í líka stórum vanda at koma í álvarsliga ferðsluvanlukkum sum tey, ið hava aldur at koyra bil. Hetta er ein av orsøkunum til, at Ráðið fyri Ferðslutrygd leggur doyðin á



at gera upplýsingararbeiði millum ung

Kelda: Ferðslutrygd

## 245 deyð og yvir 6.000 skadd

Fyrsta ferðsluvanlukkan í Føroyum, sum kravdi mannalív, hendi á Varmakeldueiði tann 2. september í 1928. Tá koyrdi ein lastbilur við fýra fólkum út av vegnum, og førarin doyði.
Síðani tá hava 245 fólk latið lív í ferðsluni í Føroyum.
Metingar siga, at o. u. 6.075 fólk hava fingið skaða í ferðsluni, og av teimum hava 608 fingið varandi mein.



## Ein sannroynd

Í 1950- og 1960-árunum doyði í miðal um 5 fólk um árið í Føroyum fyri hvørji 100.000 fólk

Í árunum 1970-79 vaks talið til 13 og frá 1980-89 til 19.

Í árunum 1990-2001 lækkaði miðaltalið niður í 10 deyð fyri hvørji 100.000

## Ræðandi hagtøl...

- Tað er í miðal eitt ár og tríggir mánaðir ímillum, at eitt barn, ið er yngri enn 13 ár, doyr í ferðsluni í Føroyum!
- Um somu ferðsluviðurskifti vóru í Føroyum, sum tey eru í Danmark, vóru í minsta lagi tvey ár og tíggju mánaðir ímillum, at tað ræðuliga hendi, at eitt barn, iðvar yngri enn 13 ár doyði í ferðsluni!
- Vóru somu ferðsluviðurskifti vóru í Føroyum sum í Svøríki, vóru í minsta lagi fimm ár og ein mánaður ímillum, at tað ræðuliga hendi, at eitt barn, ið er yngri enn 13 ár, doyði í ferðsluni!

*Kelda: Ferðslytrygd*




# Haldið Sosialin!

400,- kr. um ársfjórðingin

- sparið 380,- kr.
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Postnr.: ____________

Bygd/býur: ____________

Telefon nr.: ____________

Undirskrift: ____________

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin